Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



Ejler Djurhuus:

# Eingin dømdur fyri skotið móti sýslumanshúsinum

**Í seinasta parti greiddi Ejler frá, tá ið tað í 1955 varð skotið inn í sýslumanshúsini. Nógv og væl varð kannað, men eingin varð dømdur**

Meðan eg saman við politistunum leita eftir sporum frá skotunum, rennir hundurin seg niður í seks ella sjey patrónhylstur. Hann hevur so vitað, hvat hann hevur leitað eftir. Tað var skjótt, at funnið varð fram til, at hetta var lóður til eina Stengun. Hetta var ein 9x10 mm maskinbyrsa. Hesar vóru nógv brúktar av mótstøðurørslunum í Danmark og Noregi undir týsku hersetingini 1940-45.

Øll vikan fór við at avhoyra vitni, og tey mundu vera eini 150 í tali. Men einki kom burtur úr hesum avhoyringum.

So var farið at kanna, hvat ið var hent fyrr av sama slag, og hvat ið fólk høvdu hoyrt. Viðurskiftini eru jú smá, so fólk fóru at tosa um, hvør ið átti slíkt vápn og hvør, ið ikki átti.

Slóðin gekk meira og meira út í Froðba. Har skuldi vera ein maður, sum átti slíka pistól.

Patrónhylstrini vórðu send til ríkispolitiið. Tann, sum var leiðari á viðkomandi deild, var kendur um allan heimin sum serkønur í skotvápnum.

Eina ferð fortaldi ein maður, at hann mintist, at ein maður í Froðba lýsti í Dimmalætting eina maskinbyrsu til sølu. Tá fóru vit at avhoyra fólk, sum búðu har úti. Tá fortaldi eitt vitni, at hann hevði verið við til at skjóta við eini maskinbyrsu, sum viðkomandi átti. Teir høvdu skotið kettlingar í einum hyli niðri við sjóvarmálan.

Tá hann er farin helt kriminalpolitisturin, at vit skuldu farið at leita, um vit funnu nakað hylstur. Eg ivaðist. Tað vóru so mong ár farin, og økið lá undir í brimi um veturin. Men teir hildu, at tað var líka mikið, hvussu lítil kjansurin var, tað mátti roynast. Vit fóru so út hagar, og viðkomandi vitni vísti okkum, hvar hetta hevði gingið fyri seg, at hann hevði skotið hesar neyðars kettlingar. Vit leitaðu og funnu einki. So sigur annar danin, at hann, sum kann finna eitt hylstur ella projektil, hann skuldu fáa eina fløsku av snaps. Tá hendi tað, at hann sum hevði fortalt um hetta, vendi einum steini, og har lá eitt hylstur.

Hetta varð eitt virðismikið prógv, um tað kundi setast í samband við skotini.

Hylstrið varð sent á politistøðina í Keypmannahavn, og tað varð staðfest við 100% vissu, at hetta var sama byrsa, sum skotið varð við. Kúlan samsvaraði við tómu patrónhylstrini. Maðurin, sum átti byrsuna varð sjálvandi avhoyrdur, og hann segði, at hann hevði søkt byrsuna eitt hálvt ár frammanundan.



*Ejler t.v. seinast í 1940-unum saman við húskallinum Marius*

Maðurin varð eisini rættarsøktur, men hann varð fríkendur »på bevisets stilling.« Tað bar ikki til at prógva, at tað var júst hesin maður, sum hevði skotið.

Maðurin fór seinni til Grønlands, og har hevði hann reypað av hesum. Tað er ikki longur síðan enn seinasta heyst, tá ringdi Marner á Kák, mín gamli starvsfelagi. Hann var eina tíð í Grønlandi, har hann arbeiddi hjá fútanum. Hann fortaldi, at hann hevði hitt ein mann, sum var av Tvøroyri, og hann hevði sagt, at hann hevði skotið. Men tá vóru aftur so mong ár liðin.

Endin á málinum ergraði hesar donsku kriminalløgreglumenn. Teir høvdu brúkt so nógva tíð uppá hetta. Og tá tað var prógvað, hvat vápn tað var, og tað eisini var prógvað, hvør ið hevði átt vápnið, at so einki kom burturúr. Men tað bar bert ikki til at mótprógva, at maðurin segði seg ikki hava verið har.

## Fjølbroyttar uppgávur hjá sýslumanni

Uppgávan hjá einum sýslumanni spennir nokk so vítt. Fyrst og fremst er hann ovasti politimyndugleiki í sýsluni. Av øðrum uppgávum kann nevnast »landvesinkommissiónin«. Her byrja allar útskiftingar, sum ofta eru sera arbeiðskrevjandi.

Tað kundi eisini vera nakað sum kallast sýslupolitirættur. Hetta kundi umfata brot á veiðilógina. Sýslumaðurin skuldi skipa fyri grannastevnum. Hann var eisini tollmyndugleiki. So var tað fútarættur og skiftirættur. Fútarættur er eitt øki, sum er vaksið sera nógv. Hann viðvíkir nógv av teimum mongu húsagangunum, sum hava verið í Føroyum.

Eisini er tað ofta uppgávan at royna semju millum fólk. Tað er jú eitt kent fyribrigdi at »melda« hvønn annan til sýslumannin. Hetta varð eisini javnan brúkt sum ein hóttan manna millum. Men slíkir trupulleika kundu ofta greiðast við at tosa partarnar til rættis, tá ið teir vóru kølnaðir aftur. Kanska var hetta meira í pápasa tíð.

Gudmund Effersøe var fyrst settur sýslumaður í Hvalba, men flutti seinni til Tvøroyri, har hann bygdi í Heiðunum, sum tað verður kallað. Tað er beint á markinum millum Trongisvág og Tvøroyri uttanfyri har, Keypssamtøkan er.

Hetta hevur vist verið í 1890-unum. Hann sat so sum sýslumaður til aldaskiftið. Tá tók Olivur, sonur hansara, við. Hann gjørdist eisini ein kendur politikari sum formaður í Sambandsflokkinum og sum limur í løgtinginum og fólkatinginum.

Oliver var so nógv burtur, at eitt skifti mátti ein Mortensen loysa hann av.

Eina tíð var Suðuroyggin býtt í tvær sýslur, men nú er hon aftur ein. Í Vági varð upprunaliga settur ein »sóknarfúti«. Gunnar Dahl Olsen, sum var vágbingur, var eina tíð sóknarfúti, til hann gjørdist sýslumaður í Vestmanna.

Tað var sum avloysari fyri sóknarfútan, at Suðuroyggin varð býtt sundur sum sýsla, og tá varð hvørgin sýslumaðurin ordiliga løntur.

## Fluttu inn við Rangá

Vit fluttu inn her 31. okt. 1989 at búgva fast. Hetta var ein ring byrjan. Dagin eftir skuldu vit suður til Vágs til Smyril at heinta dóttrina Heidi, sum var illa sjúk. Hon kom suður í sjúkrabili, og hon doyðu 13. januar, tveir mánaðir seinni.

Dagar við talinum 1 og 3 hevur verið eitt merkiligt óeydnistal hjá okkum. Beiggi mín Erling doyði í januar 1986, og hann fór til gravar 13. Johan beiggi mín doyði 13. januar, kona mín Sigga doyði 13. januar. Hans Andreas tann næstelsti av okkum beiggjunum doyði 31. januar, t.v.s. tað øvugta av 13. So januar hevur verið ein nokk so tungur mánaði.

Eg havi nú verið pensioneraður í 20 ár, og eg royni at vera virkin. Eg havi eisini seyð, sum er eitt gott ítriv. Eisini havi eg verið virkin í Lions í Suðuroy.

Børnini eru Heidi f. 1952, sum doyði í jan 1990, Anni f. 1953, Bogi f. 1955, Kári f. 1957 og Randi f. 1959

Abbabørnini eru níggju, Svanna, Rúni, Annika, Marin, Lávus, Egi, Hjalti, Sára, Heidi

Langabbabørnini eru fýra, Bjarta, Marita, Bastian, Anna Sofía.



*Ejler og Sigga á páskum 1989 saman við børnum, verbørnum og barnabørnum*



*Lávus (sonur Kára) Anni Nielsen (dóttir) Svanna Nielsen (dóttir Anni) smágentan Bjarta (dóttir Svannu) Egi (sonur Kára) Ejler, Kári Djurhuus (sonur), smádrongurin Hjalti (sonur Kára), Heidi (dóttir Boga), Bogi Djurhuus (sonur), frammanfyri, Unn Dimon (kona Boga) Sára (dóttir) Boga*

## Tøkk til Ejler

Nú er so komið til endan av hesi frásøgn hjá Ejler á hesum sinni. Hansara íkast til hesa greinarøð hevur verið sera áhugavert. Her skal bert skoytast uppí, at Marna Joensen av Eiði, f. Nolsøe, ættað av Tvøroyri, hevur greitt frá, at hon passaði Siggu upp, tá ið hon átti tey fyrstu trý av teirra børnum. Marna letur sera væl at, hvussu góð tey vóru at vera hjá. Sigga og Ejler vóru bæði stásfólk.